# nnulívssøgu

um á bretskum øki. -Vit vóru so hepnir at fáa avtalu júst við tað samtakið, sum fann olju í 2001, ein fundur, sum enn verður kannaður og viðgjørdur.

Nevndarformaðurin helt fyri, samstarvið í samtakinum gav sambond og innlit og samstarv við umfatandi ráðgevara umhvørvið í Bretlandi og íløgubankar. Hetta gjørdi at farast kundi undir næsta stigið royna at keypa seg inn í framleiðandi leiðir ella leiðir, sum vóru um at fara undir framleiðslu í bretska partinum av Norðsjónum, og hetta eydnaðist í 1993 við keypi av parti í trimum leiðum frá Premier Oil.

Hetta var eisini møguligt, tí stuðulin frá føroyskum íleggjarum hevur verið ósvitaligur hvørja ferð partabrøv vórðu bjóðað út í Føroyum.

Felagið hevur verið rikið smidliga við sera fáum føstum starvsfólki, men við fólki at við serkunnleika knýttum at, so allar avgerðir í felagnum vera tiknar í tryggum grundarlagi.

Nevndarformaður vísti á broyttu umstøðurnar hjá felagnum. – Vit byrjaðu við at avmarka rættin til at eiga partabrøv til føroyingar. Eisini skuldi nevndin góðkenna allan handil við partabrøvum, so tey, sum settu pening í felagið, høvdu fáar møguleikar at selja partabrøv, og virðið hevur verið óvíst. Hesar avmarkingar eru nú burtur, og partabrøv í AK eru nú fult umsetilig og kunnu handlast, tá tørvur er á tí á virðisbrævamarknaðinum.

Við hesum er AP vorðið eitt búgvið partafelag, sum loyvir partaeigarum at gera sum teimum tænir best at fáa virðið burtur úr íløgum sínum og loyvir nýggjum íleggjarum upp í.

Her steðgar menningin ikki langt frá tí, men við hesum hevur felagið - og nevndin - givið seg undir tann disiplin, sum marknaðurin.

Kjartan Hoydal vísti á, at felagið við hesi tilgongd skrivar vinnulívssøgu. - Hetta er eitt fyrsta stig burtur úr tí stirvna fíggingarmynstrinum, sum eftir mínum tykki hevur bundið føroyskt vinnulív niður alt ov leingi. Føroyskt vinnulív má sum frálíður sleppa fram at somu fíggjarskipanum sum kappingarneytar í londunum um okkum. Hetta er ein avgerandi fyritreyt fyri vinnuligari menning í Føroyum.

∆

# ann geva

• Í hesum sambandi hava Atlantic Petroleum og Kaupthing gjørt eitt samstarv, har Kaupthing virkar sum market makari. Tað merkir, at Kaupthing tryggjar, at tað altíð er gjørligt at handla fyri eina ávísa upphædd.

Um AP klárar at uppfylla hesi øki og annars klárar at gera nýtslu av marknaðinum - og tað eri eg sannførdur um - verður skrásetingin, sum nú er hend, eitt týðandi avsett til at uppfylla tær ætlanir, sum AP hevur um vøkstur. Bæði á føroyskum og útlenskum øki.

Sjálv skrásetingin hendir við, at nevndin í ICEX góðkennir eitt prospekt, sum gjølliga lýsir Atlantic Petroleum og virksemið í felagnum. Hetta er eitt rættuliga tíðarkrevjandi arbeiði at greiða úr hondum. Men út yvir hetta skal felagið eisini í aðrar mátar gerast klárt til eina skrásteting við at innanhýsis mannagongdir - bæði kravdar og aðrar sum ikki eru kravdar, men sum eru neyðugar fyri at gera felagið áhugavert á marknaðinum - eru uppá pláss. Talan er t.d. um mannagongdir, sum tryggja, at marknaðurin til eina hvørja tíð fær týðandi upplýsingar frá felagnum, áðrenn fjølmiðlarnir fáa teir, at fólk, sum hava eina serliga vitan um felagið - sonevndir insidarar - ikki hava møguleika fyri ótarnaðir at keypa og selja partabrøv í felagnum. At strangari krøv vera sett til rapportering og ger av roknskapum osfr. segði Petur Holm.



*Sosialurin er nú mest lisnað tíðindablaðið í landinum. Ábyrgdarblaðstjórin ætlar, at blaðið skal liva upp til álitið, sum fólk hava givið blaðnum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Sosialurin er landsins største tíðindablað

**Sosialurin hevur lagt seg fram um øll hini tíðindabløðini í landinum, tá ið tað ræður um lesarar. Ein kanning hjá Gallup vísir, at 53 prosent av øllum føroyingum yvir 15 ár lesa Sosialin. Ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum sigur, at blaðið ætlar liva upp til álitið**

MIÐLAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sosialurin er mest lisnað tíðindablaðið í Føroyum.

Tað vísir ein nýggj kanning hjá Gallup Føroyum.

Í eitt ár – frá mars mánaði í fjør til mars mánaði í ár – hevur Gallup savnað lesaratøl fyri føroysku bløðini, og úrslitið er, at Sosialurin verður meira lisin enn hini tíðinda-bløðini.

Ovast á listanum er Vikublaðið, sum verður borið ókeypis í hvørt hús í landinum hvønn týsdagin. Men tá ið tað ræður um tey vanligu tíðindabløðini, sum føroyingar gjalda fyri, hevur Sosialurin størsta undirtøku. 53 prosent av øllum føroyingum yvir 15 ár lesa Sosialin.

– Vit fegnast um, at vit eru blivin størsta tíðindablað í landinum, men vit ætla okkum ikki at leggja okkum afturá nú. Blaðið fer framhaldandi at menna seg, og vit ætla at liva upp til álitið, vit hava fingið frá fólki, og við tíðini skulu vit í enn størri mun gerast fólksins blað, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.

### Fram um Dimmu

Dimmalætting hevur í nógv ár verið roknað sum størsta blaðið í landinum, men kanningin hjá Gallup vísir, at fleiri fólk lesa Sosialin enn Dimmu. 48 prosent av føroyingum lesa Dimmalætting.

Kanningin hjá Gallup vísir, at eins nógvar kvinnur sum menn lesa Sosialin. 53 prosent av øllum kvinnum og 53 av øllum monnum lesa blaðið.

### Fólk taka blaðið til sín

Tá ið hugt verður eftir aldursbýtinum vísir tað seg, at fólk í øllum aldri lesa Sosialin. Serliga nógv fólk í aldrinum frá 20 til 49 ár lesa Sosialin, meðan lutvíst færri fólk yvir 60 ár lesa blaðið.

– Fólk um alt landið í øllum aldri og við øllum áhugamálum lesa okkara blað, og hetta vísir bara, at fólk hava tikið Sosialin til sín. Eg meti, at tann fjølbroytti tíðindaflutningurin hjá okkum eigur ein stóran part av heiðrinum fyri hetta, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri.

### Betra blaðið

Sosialurin flutti fyrr í ár av Argjum og í Vágsbotn í miðbýnum í Havn, har Miðlahúsið er blivin ein nýggjur miðdepil hjá blaðnum.

– Vit fingið framúr góðar fysiskar karmar, og tað, sum vit nú arbeiða við, er at menna tað redaktionella arbeiðið og umstøðurnar, so vit fáa eitt enn betri blað, sigur Jan Müller.

– At so nógv fólk lesa blaðið, og at vit eru blivin største tíðindablaðið í landinum, setir bara størri krøv til okkum, og vit ætla at liva upp til hesi krøv. Vit skulu royna at gera alt betri, sigur ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum.

## FAKTA

Gallup hevur kannað, hvørji bløð føroyingar lesa. Úrslitið er niðanfyri, og tølini skulu lesast sum prosent av øllum føroyingum yvir 15 ár.

| | |
|---|---|
| Oyggjatíðindi | 8% |
| Vinnuvitan | 10% |
| Norðlýsið | 13% |
| FF-Blaðið | 16% |
| Trúboðin | 19% |
| Kvinna | 30% |
| Dimmalætting | 48% |
| Sosialurin | 53% |
| Vikublaðið | 64% |